Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 27.08.2020 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Jóhan Christiansen
Brandur Jacobsen
Árni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Tollakur Joensen
Hans Mourits Foldbo
Gudny Langgaard
Uni Rasmussen
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt: Tollakur Joensen

Nevndarskrivari: Erik Iervig


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 55/20 | 20/00277-3 | 20/00277 -Umsókn um byggiloyvi til um- og nýbygging av sethúsum Úti í Bø 7 - SG | 3 |
| 56/20 | 20/00293-2 | Mál nr. 20/00293 - Gøta omanfyri matr. nr 339l í Fløtugerði | 4 |
| 57/20 | 20/00093-1 | Mál 20/00093 Uppíbygningur til nýggja lugarið | 5 |
| 58/20 | 20/00297-2 | 20/00297 - Asfaltering av havnalagnum í Leirvík | 7 |
| 59/20 | 20/00036-12 | Mál nr. 20/00036 - Arbeiðstøka – Pumpuleiðing millum brunnar á havnarlagnum í Norðragøtu | 8 |
| 60/20 | 19/00130-2 | Mál 19/00130 - Veganøvn til útstykking í Norðragøtu. Málslýsing og tilmæli. | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 61/20 | 20/00221-2 | Mál 20/00221 Navn á vegnum til fjósið hjá Regin Borðoy, millum Fjarða. Málslýsing og tilmæli | 10 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 55/20 20/00277 -Umsókn um byggiloyvi til um- og nýbygging av sethúsum Úti í Bø 7 - SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.08.2020 | 25/20 | 20/00277-3 |
| 2 Býráðið | 27.08.2020 | 55/20 | 20/00277-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Vit hava móttikið eina umsókn um um- og nýbygging av sethúsum Úti í Bø 7, Syðrugøtu.<br><br>Um umsóknin skal gangast á møti, má frávik gevast til hæddina frá grund til yvirgrind.<br>Sambært §3. Stk. 4 í byggisamtyktini skal tað ikki vera meir enn 5 metur til yvirgrind og 8,5 metur til mønuna.<br><br>Tó skal viðmerkjast at samlaða hæddin ikki verður hægri enn 6,61 metrar, tað svarar til yvirkant á kvistinum, sum hann er í dag (mált frá vegi). |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsóknini á møti. |

**Býráðið 27. august 2020**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

# 56/20 Mál nr. 20/00293 - Gøta omanfyri matr. nr 339l í Fløtugerði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.08.2020 | 26/20 | 20/00293-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.08.2020 | 50/20 | 20/00293-2 |
| 3 Býráðið | 27.08.2020 | 56/20 | 20/00293-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið eina áheitan um at gera eina sniðgøtu í Leirvík, sum gongur frá Bóndagerði til útstykkingina í Fløtugerði.<br><br>Um sniðgøtan verður gjørd, inniber tað at man møguliga missur grundøki á matr. nr. 339m.<br><br>Víst verður eisini til upprunaliga uppskot hjá SNA Arkitektar. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ein sniðgøta frá Bóndagerði til Útstykkingina í Fløtugerði er mett til at kosta 150.000 kr.<br>Eingin játtan er til endamálið í fíggjarætlanini fyri 2020. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Fíggjarnevnd 25. august 2020**

Fíggjarnevndin mælir til at útseta søluna av matr. nr. 339m til støða er tikin til gøtu ella veg.

**Býráðið 27. august 2020**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

# 57/20 Mál 20/00093 Uppíbygningur til nýggja lugarið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 20.04.2020 | 10/20 | 20/00093-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 27.04.2020 | 24/20 | 20/00093-1 |
| 3 Mentanarnevndin | | | 20/00093-1 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.08.2020 | 27/20 | 20/00093-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 25.08.2020 | 51/20 | 20/00093-1 |
| 6 Vinnunevndin | 24.08.2020 | 30/20 | 20/00093-1 |
| 7 Býráðið | 27.08.2020 | 57/20 | 20/00093-1 |

**Málslýsing:**

Uppskot er komið frá Teknisku umsiting um at gera uppíbygning til nýggja lugarið í Leirvík.

Ætlanin er at taka køkin niður í verandi lugari og gera hol í veggin til nýggja uppíbygningin. Síðani verður nýggjur bygningur gjørdur ímillum nýggja lugarið og niðasta neysti. Við í uppskotinum av nýggja uppíbygninginum er ein goymsla norðeftir v/lofti, við somu vídd sum lugarið. Bygningurin verður eisini í tveimum hæddum, og tak verður lagt á.

Nýggi uppí bygningurin verður í tveimum, har nýggja hølið til Lugarið verður er 7,66 m 3,878m, sum tilsamans gevur eina vídd á  29,71 fermetrar. Verandi lugar er er 18.3 fermetrar. Sostatt verður sjálvt Lugarið 48 fermetrar.
Køkurin verður fluttir inn í nýggja uppíbygningin

Kostnaðarmetingin er 1.593.750 við kommunu-Mvg

**Ískoyti 18.08.2020**
Tilboðini blivu latin inn tann. 18.08.2020
Tvey tilboð komi inn.
Búsetur hevði lægsta tilboð. Tilboðið er áljóðandi 1.265.638 kr. u/MVG.

Afturat hesum koma útreiðslur í samband við byggiharraveiting og MVG. Samanlagt blívur upphæddin so 1.480.000 kr.

1.500.000 kr. er játtað til verkætlanina.

Viðmerkjast skal at EL og HVS ikki er við í hesum tilboð, metingin fyri tað er 400.000 kr. Tískil má tað takast við, tá fíggjarætlanin fyri 2021 verður gjørd.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

1.500.000 kr. eru settar av til útbygging av Lugarinum í 2020.

**Tilmæli**

| |
|---|
| Mælt verður til at innheinta tilboð upp á verkætlanina skjótast gjørligt.<br><br>**Ískoyti 18.08.2020**<br>Mælt verður til at taka av tilboðið frá Búsetur og seta verkætlanina í gongd. |

**<u>Vinnunevndin 20. april 2020</u>**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at innheinta tilboð upp á verkætlanina. Hetta skal tó verða við tillagingum, har vit møguliga skula flyta tøknirúmið og taka støðu til, hvat slag av hita skal verða í goymsluni.

**<u>Fíggjarnevnd 27. april 2020</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hja vinnunevndini.

**<u>Vinnunevndin 24. august 2020</u>**
Vinnunevndin mælir til at EL og HVS verður boðið út, so at samlaða verkætlanin kann verða løgd fyri býráðið í september.
Vinnunevndin ynskir samstundis at síggja, hvør ætlanin er við goymsluni.

**<u>Fíggjarnevnd 25. august 2020</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 27. august 2020</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 58/20 20/00297 - Asfaltering av havnalagnum í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.08.2020 | 53/20 | 20/00297-2 |
| 2 Býráðið | 27.08.2020 | 58/20 | 20/00297-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Samtykt er at asfaltera havnalagi í Leirvík.<br><br>Kostnaðurin av hesum verður 1,7 mió. kr. Eingin Játtan er til arbeiðið |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eyakjáttan á 1,7 mió. kr. til arbeiðið |

**Fíggjarnevnd 25. august 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á 1,5 mió., og taka peningin av konto 62411 (Asfaltering av vegum) og konto 62411 (Vegur eystanfyri ánna)

**Býráðið 27. august 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 59/20 Mál nr. 20/00036 - Arbeiðstøka – Pumpuleiðing millum brunnar á havnarlagnum í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.08.2020 | 52/20 | 20/00036-12 |
| 2 Býráðið | 27.08.2020 | 59/20 | 20/00036-12 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Verkætlanin ”*Pumpuleiðing á havnarlagnum í Norðragøtu”* bleiv tann 22.06.2020 bjóða út og tilboðini komu inn 14 juli 2020.<br><br>Bjóðandi:<br>J&K Petersen - 760.478,00 kr. u/MVG.<br>Verkon - 842.200,00 kr. u/MVG.<br><br>Lægsta tilboð er áljóðandi 760.478 kr. u/mvg. Játtanin til verkætlanina er 700.000 kr.<br><br>Afturat hesum kemur 115.000 kr. fyri ráðgeving, 76.000 til óvænta, og mvg.<br><br>Samlað kemur tað at kosta 1.010.945 kr. Tað vil siga at vit mangla 311.000 kr. til verkætlanina. |
| |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 700.000 er sett av til verkætlanina í fíggjarætlanini fyri 2020. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at geva eykajáttan á 311.000 kr. og seta verkætlanina í gongd. |

**<u>Fíggjarnevnd 25. august 2020</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka av lægsta tilboðnum, og at írestandi peningurin á kr. 311 t.kr verður tikin av konto 62211 (kloakk á Toftanesi) og konto 61011 (kloakk ognarhagin í LV)

**<u>Býráðið 27. august 2020</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

## 60/20 Mál 19/00130 - Veganøvn til útstykking í Norðragøtu. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Navnanevndin | 20.08.2020 | 1/20 | 19/00130-2 |
| 2 Býráðið | 27.08.2020 | 60/20 | 19/00130-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Til viðgerðar var uppskot til vegnanøvn til útstykking í Norðragøtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Navnanevndin 20. august 2020**

**11. apríl 2019**

Navnanevndin mælir til, at býlingurin verður nevndur “við Myllá”. Hetta er við teirri grundgeving, at áin rennur mitt ígjøgnum býlingin.
Navnanevndin viðger gøtunøvnini í nýggja býlinginum á næsta fundi.

**20. august 2020**

Navnanevndin mælir til at høvuðsvegurin við Myllá, t.e. vegur 01 og 02 á støðumynd 0.02, skal eita Myllágøta.

Navnanevndin mælir til, at vegur 03 á støðumynd 0.02 skal eita “í Pálsliða”.

Navnanevndin hevur harafturat hesa viðmerking: Heitt verður á kommununa at toftin hjá Palla-Páll í Liða verður varðveitt, og at skelti við navni og søgu verður sett upp á staðnum.

**Býráðið 27. august 2020**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini.

## 61/20 Mál 20/00221 Navn á vegnum til fjósið hjá Regin Borðoy, millum Fjarða. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Navnanevndin | 20.08.2020 | 2/20 | 20/00221-2 |
| 2 Býráðið | 27.08.2020 | 61/20 | 20/00221-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Mál til viðgerðar - Navn á vegnum til fjósið hjá Regin Borðoy, millum Fjarða |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Navnanevndin 20. august 2020**

Vísandi til at landsvegurin eitur Millum Fjarða og at festir á somu síðu sum hjá Regin Borðoy longu hava adressu, sum eita Millum Fjarða, (dømi «Millum Fjarða 15» – festið hjá Líggjas Húsgarð) mælir Navnanevndin til, at hildið verður fast við, at síðuvegir til landsvegin «Millum Fjarða» framvegis fáa adressuna»Millum Fjarða» og hóskandi tal í mun til frástøðu millum festini.

**Býráðið 27. august 2020**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini.

fundurin lokin kl. 18.00

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Hanna Jensen